# Heildarsavn Christians Matras útkomið

**Leygardagin var bókaframløga á Viðareiði í sambandi við, at Bókadeild Føroya Lærarafelags hevur givið út heildarsavn við øllum yrkingum og enduryrkingunum hjá Christiani Matras**

ÚTGÁVA
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*



*Bókaframløgan á Viðareiði byrjaði í kirkjuni, har 17 sangarar sungu seks yrkingar eftir Christian Matras*

**Viðareiði:**
Tað var ikki av ongum, at útgevarin av heildarsavninum hevði valt at leggja framløguna á Viðareiði. Christian Matras varð føddur har og búði har, til hann var um 12 ára gamal.

Hóast hann flutti úr heimbygdini á so ungum árum, er ongin ivi um, at tann náttúran, sum var um hann tey fyrstu barnaárini hava sett síni sermerki í hansara skaldskap.

Nógv fólk vóru savnað til framløguna, har sangur, røður og annað var á skránni.



*Anne-Kari Skarðhamar úr Oslo, sum vardi doktararitgerð um skaldskap Christians í 2001, hevur í savninum eftirskrift um yrkingarnar og týðingarnar umframt hugleiðingar um skaldið*

### Sangir og røður

Framløgan byrjaði í Viðareiðis kirkju, har 17 sangarar sungu seks yrkingar hjá Christiani. Jógvan við Keldu hevði til hetta høvið tilrættislagt eina framførslu av Summarkvøld. Ein frálík framførsla, má sigast, og hárini høvdu hug at reisa seg, meðan sangararnir sungu hetta vakra lagið, sum av sonnum er vorðið ein fólkaogn.

17 sangarar sungu eisini Lækjan, Barn ,Tú gakk tær fram við ánni, Dimmið og so Havrin, sum Christian Matras umsetti úr donskum.

Tá sangløtan í kirkjuni var liðug, varð farið yvir í gamla skúla, har Anne-Kari Skarðhamar, lektari við læraraháskúlan í Oslo, sum hevur savnað, skipað og skrivað eftirskrift í bókini, greiddi frá sínum arbeiði í sambandi við útgávuna. Hon kom millum annað inn á, hvussu ein velur tær ymsu yrkingarnar. Um tað skal vera upprunayrkingin ella tann broytta og so framvegis.

Tá hon var liðug at greiða frá, tók Andreas Justesen yvir. Hann greiddi frá, hvussu hann mintist Christian Matras og eisini tosaði hann nógv um hansara skaldskap.

Andreas tók millum annað til, at um Christian varð føddur á einari pannukøkuoyggj, so hevði hann ikki yrkt, sum hann gjørdi.

### Stuðlar

Bókadeild Føroya Lærarafelags gevur vanliga mest ungdóms- og barnabøkur út. Niels Jákup Thomsen segði, at hetta savnið ikki hevði komið út uttan stuðlar. Í tí sambandinum handaði hann báðum stuðlunum, Viðareiðis kommunu og Norðoya Sparikassa, eitt eintak av bókini sum tøkk fyri stuðulin.

Umboðið fyri sparikassan, Finn Kjølbro, segði, at hann kendi Viðareiðis bygd gjøgnum skaldskapin hjá Christiani, áðrenn hann nakrantíð hevði verið har.

Borgarstjórin á Viðareiði Jógvan Nybo segði millum annað, at tað hevur stóran týdning, at alt tilfar, sum kemur út á føroyskum fær stuðul.

Síðani var ein kaffimuður við køkum aftur við at fáa, har fólk eisini fingu høvi at ogna sær yrkingasavnið heldur bíligari enn vanliga kostnaðarprísin, sum er 350 krónur.

Gevur útgávan yvirskot, fer peningurin óskerdur í Grunn Kristjans á Brekkumørk, ið veitir sømdargávu til fólk, sum starva til frama fyri okkara móðurmál.

Einars Prent hevur umbrotið, heft og prentað.



*Andreas Justesen hevði eina frálíka og til tíðir skemtiliga framløgu um skaldið Christian Matras*

# Síggja og læra

**Bretski fískimálaráðharrin, Ben Bradshaw, kom til Klaksvíkar við Brimli fríggjamorgunin. Hann vitjaði millum annað Kósavirkið og var til døgurða, har Klaksvíkar kommuna var vertur. Endamálið var at síggja skipanina í Føroyum og møguliga læra av henni, segði hann**

VITJAN
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*



*Tíðindafundurin var heldur øðrvísi enn vanligt. Bretski fiskimálaráðharrin vildi ikki hava ein so formellan fund, og tí varð hann hildin uttandura í frálíka veðrinum*

**Klaksvík:**
Ben Bradshaw vitjaði í Klaksvík í nakrar tímar, áðrenn leiðin gekk aftur til Havnar við Brimli. Hann nýtti høvi at tosa við føroyska fiskimálaráðharran, Bjørn Kalsø, um føroysku fiskivinnuskipanina.

Ben Bradshaw segði, at hann hevði fingið nógv áhugavert at vita, men tó var ov tíðliga at siga nakað um, um hann fer at gera nýtslu av nýggju vitanini.

Vitjanin hjá honum í Føroyum er ein liður í einari rundferð, sum hann ger til fleiri partar av heiminum fyri at síggja, hvussu tær ymsu fiskivinnuskipaninar eru uppbygdar.

– Við at síggja, hvussu tær virka aðrastaðni, kann man møguliga taka eitt sindur frá hvørjum, tí eitt er givið, og tað er, at allar skipanir hava vansar eins væl og fyrimunir, segði Ben Bradshaw millum annað á stutta tíðindafundinum uttan fyri býráðshúsið fríggjadagin.

Bjørn Kalsø, landsstýrismaður, segði, at bretski fiskimálaráðharrin serliga lat til at vera áhugaður í fiskidagaskipanini. Eisini var hann áhugaður í, hvussu bólkarnir verða gjørdir.

– Tað tók eina løtu, áðrenn hann fekk við, at vit hava skipabólkar. Men tá hann so skilti tað, tóktiskt hann sera áhugaður í tí eisini, greiddi Bjørn Kalsø frá.

### Onga grind

Jákup Ziskason og hansara harkalið høvdu borðreitt eitt fiskaborð til bretsku gestirnar. Har var nógv ymiskt at fáa, millum annað grind og spik og turrur fiskur umframt nógv annað gott.

Bretski fiskimálaráðharrin vildi tó ikki royna grind ella spik, men hann lat væl at tí turra fiskinum.

– It didn´t appeal to me, svaraði hann, tá fjølmiðlarnir spurdu hann, hví hann ikki royndi grindina.

Hann segði, at bretska stjórnin er ímóti grindadrápi. Ikki bara tí drápini eru so barbarisk, men eisini tí at tað ikki letur til at vera nakar veruligur marknaður fyri tvøstinum.

– Men bretska stjórnin fer ikki at luttaka í einum boykotti móti føroyingum fyri tað. Vit gera bara okkara støðu til grindadráp púra greiða og vóna, at tit einaferð fara at broyta hugburð, segði Ben Bradshaw.

Bretski fiskimálaráðharrin fór úr aftur Føroyum leygarmorgunin. Hann helt ikki, at steðgurin í Føroyum var ov stuttur. Heldur øvugt, segði hann, var túrurin í Føroyum ein av teimum longru samanborið við aðrar líknandi ferðir hjá honum.



*Bretski fiskimálaráðharrin Ben Bradshaw, borgarstjórin í Klaksvík, Steinbjørn Jacobsen og verturin fyri vitjanini, landsstýrismaðurin í fiskimálum, Bjørn Kalsø*



# MBM flytur alt til Havnar

**Fyrst í komandi ári fer MBM at savna alt sítt virksemi í høvuðsstaðnum. Tey 15 fólkini, sum starvast hjá fyritøkuni í Kollafirði, hava fingið bjóðað starv í Havn ístaðin**

MIÐSAVNAN
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*



*Tá ið nýggi bygningurin hjá MBM í Hoyvík verður liðugur fyrst í komandi ári, skal alt virksemið hjá fyritøkuni savnast á einum stað*

MBM er í løtuni í ferð við at byggja ein nýggjan bygning beint við síðuna av núverandi hølunum hjá fyritøkuni við Vegin Langa í Hoyvík. Nýggi bygningurin skal hýsa bæði sølubúð og skrivstovum.

### Hava livað í óvissu

Eirikur Thorvaldsson, stjóri í MBM, sigur, at leiðslan í fyritøkuni leingi hevur havt eitt ynski um at savna alt virksemi í høvuðsstaðnum. Sum kunnugt brann goymslubygningurin hjá MBM í Kollafirði í grund fyri fáum árum síðani, og eisini við hølunum hjá Royndarstøðini hevur stór óvissa valdað. – Vit hava fleiri ferðir hoyrt frá landsins myndugleikum, at hølini, sum vit leiga frá Royndarstøðini, heldur skulu nýtast til okkurt annað, og tí hava vit faktisk livað í óvissuni leingi, sigur Eirikur Thorvaldsson.

Stjórin í MBM sigur eisini, at ætlanin var eisini at byggja ein nýggjan bygning í Kollafiriði ístaðin fyri tann gamla, sum brann í grund, men fyritøkan bleiv ikki víst á nakað øki, sum kundi nýtast til endamálið, og tí verður bygt í Havn.

### Betri yvirlit at savna alt

Nú alt virksemi verður savnað á einum stað, sigur Eirikur Thorvaldsson seg ikki verða í iva um, at tað í longdini fer at verða ein sparing hjá MBM. Somuleiðis heldur hann, at tað fer at geva eitt betur yvirlit yvir alla fyritøkuna, at alt er á einum stað. – Fyritøkan var ov spjadd, og tað verður heilt víst betur at hava til dømis ordramóttøkuna og goymsluna á sama stað, hóast tað reint tekniskt ikki er nøkur forðing fyri, at tær kunnu verða á hvør sínum stað, heldur Eirikur Thorvaldsson.

### Økja vøruúrvalið

Nýggi bygningurin skal eftir ætlan verða liðugur í fyrsta ársfjórðingi í komandi ári, men stjórin í MBM sigur, at um arbeiðið við at gera bygningin gongur við slíkari ferð, sum tað hevur gjørt í seinastuni, so verður bygningurin kanska liðugur longu fyri ársskiftið.

Tvær av teimum trimum hæddunum í nýggja bygninginum verða gjørdar til fóðursølu, meðan ovasta hæddin verður nýtt til skrivstovur. Gjørligt verður hjá viðskiftafólkunum at koyra beint inn á ovaru hæddina á fóðursøluni við bili, so at tað verður høgligari at koma til og frá, sigur Eirikur Thorvaldsson. Stjórin á MBM sigur eisini, at væntandi fer fyritøkan at økja um vøruúrvali, tá ið flutt verður í nýggju hølini, men enn er einki endaligt.

# Stjórin í Listasavninum gevst

**Eftir einans tríggjar mánaðir í sessinum fer Mathea Hilduberg seinni í vikuni frá sum stjóri fyri Listasavn Føroya**

STJÓRAUPPSØGN
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*



*Eftir einans trimum mánaðum í sessinum, gevst Mathea Hilduberg nú sum stjóri í Listasavni Føroya*
*Savnsmynd*

Í einum tíðindaskrivi boðar Mathea Hilduberg frá, at hon og nevndin fyri Listasavn Føroya eru vorðin samd um at stegða samstarvið frá komandi fríggjadegi at rokna. Hon sigur, at hon og nevndin ikki hava verið samd um raðfestingina av arbeiðinum fyri Listasavnið.

### Vildi breiðka um inntøkugrundarlagið

Mathea Hilduberg sigur í tíðindaskrivinum, at hon fyri tað fyrsta hevði raðfest høgt at sjónliggera Listasavnið og at breiðka um inntøkugrundarlagið fyri savnið.

Víðari sigur skjótt fyrrverandi stjórin í Listasavninum, at hon hevði raðfest, at tað strategiska arbeiðið við m.a. at gera eina visión verður gjørt við útgangsstøði í gjøllari kanning av málbólkinum hjá Listasavninum.

Mathea Hilduberg sigur seg harmast, at hon ikki hevði meiri tíð til at føra sínar hugsjónir út í lívið.

Vit royndu í gjár at fáa fatur á Mathea Hilduberg ella formanninum í nevndini fyri Listasavn Føroya, Helga Fossadal, men tað eydnaðist okkum tíverri ikki.

# 13 ára gomul illa brend

Ein 13 ára gomul genta fekk stóran skaða í andlitið, tá ið hon saman við øðrum javnaldrum spældi við reinsibensin uttan fyri ítróttarhøllina á Hálsi hósdagin. Børnini høvdu stoytt reinsibensin á bøin við høllina og síðani sett eld á. Tann 13 ára gamla gentan varð óansin og brendist illa í andlitinum. Gentan bleiv flutt á sjúkrahúsið við 2. grads brunasárum. Vakthavandi á politistøðini í Havn upplýsir, at málið er farið til barnaverndina í kommununi, sum skal hyggja nærri at málinum.

**tn**



*Tveir persónbilar fingu stóran skaða, tá ið eitt træ í nógva vindinum sunnudagin brotnaði niður á teir uttan fyri hjá Haraldsen í Fuglafirði*

## Skaðastormur í Fuglafirði

Tað var rættiliga nógvur vindur í Fuglafirði seinnapartin sunnudagin. Tá klokkan nærkaðist hálvgum fimm brotnaði ein stórur partur av einum stóru træ í garðinum hjá Haraldsen. Í Fuglafirði siga tey, at træið er eini 70 ára gamalt.

Træið fall á tveir bilar, sum stóðu parkeraðir uttan fyri garðin, og teir fingu báðir stóran skaða.

Á løgreglustøðini í Runavík siga tey, at tað er bert í Fuglafirði, at nakrir fráboðanir hava verið um stormskaðar, og teir vóru heilt fáir í tali. Burtursæð frá oman fyri nevnda tilburð varð talan um minni skaðar.

**el**

## Vindur tók 6-mannafar

Nógvi vindurin sunnudagin gjørdi um seg í Suðuroy. Í Hovi feyk eitt 6-mannafar, ið stóð á landi, einar 15-20 í vindinum og brotnaði. Bygdarfólkið og bjargingarfelagið í Suðuroyar sunnaru helvt savnaðu brotini saman, so tey ikki gjørdu størri skaða.

Á Drelnesi koppaði ein trailaralast á ein parkeraðan persónbil, men bilurin fekk ikki stóran skaða, verður upplýst á politistøðini í Suðuroy.

**tn**

## Stolin bilur funnin aftur í knúsi



*Stolni bilurin var illa farin, tá ið hann varð afturfunnin*

Á miðdegi fríggjadagin fekk løgreglan í Klaksvík fráboðan um ein bil, sum varð stolin. Eigarin av bilinum fann tó bilin aftur seinni sama dag uppi Undir Fossum, men tá varð bilurin í knúsi, tí hann hevði rent á ein garð. Løgreglan í Klaksvík sigur seg standa á berum í málinum.

**tn**